KRONIKK

# Politikkur er at vilja, men vilja politikarar tað rætta ella vilja teir bert valdið?

Skulu vit altíð halda okkara lyfti ella er tað loyvt at loypa frá lyftum, um tað bert er gagnligt fyri okkum? Hví skulu vit halda okkara lyfti og hvørjar eru avleiðingarnar, tá ið vit ikki gera tað? Hesir spurningar, sum heimspekingar hava kjakast um leingi, kunnu vera útgangsstøði fyri eini viðgerð av politisku støðuni í Føroyum eftir kommunuvalið, har lyftisbrot og ósannindi hava verið brúkt fyri at sleppa fram at valdinum



Hans Andrias Sølvará

Sambært grikska heimspekinginum Aristoteles er menniskjað eitt politiskt djór, t.e. eitt djór, sum livir í størri sosialum felagsskapum, býum, polis, har ávísar reglur og lógir eru galdandi. Politikkur er hinvegin at vilja, verður ofta tikið til. Ein politiskur vilji til at varðveita, broyta og menna tað samfelag, sum menniskju líva í.

Spurningurin er, hvønn leiklut moralur hevur í politikki, hvør moralur ella um hann yvirhøvur hevur nakran leiklut. Tað finnast tvær grundhugsjónir um hesi viðurskifti, realisman og idealisman. Idealisturin heldur uppá, at tað er tann almenna hugsjónin um tað rætta, sum vinnur fram í søguni, meðan realisturin heldur, at hugsjónin um tað rætta bert er eitt skálkaskjól, sum tann altíð sjálvsøkna valdsgirndin og valdið fjalir seg aftanfyri. Tað rætta vinnur ikki á valdinum, men valdið rættvísger seg við at siga seg umboða tað rætta.

Ein nær skyldur spurningur hesum viðvíkjandi er, um tað eru gerðir í sjálvum sær ella bert avleiðingarnar av gerðum, sum eru góðar. Innan moralfilosofiska økið eru tveir høvuðsskúlar hesum viðvíkjandi: Deontologar, sum halda uppá, at ein gerð bert kann vera góð, um so er, at motivini handan gerðirnar eru góðar, meðan utilitaristarnir halda, at tað ikki er gerðin í sjálvum sær, men avleiðingar av gerðini, sum kunnu vera góðar. Ein deontologur vil siga, at menniskju – uttan mun til avleiðingar - hava skyldu til at halda tey lyfti, sum tey hava givið øðrum, meðan utilitaristurin heldur uppá, at gerðir – uttan mun til lyfti ella lyftisbrot – bert skulu virðismetast eftir teimum avleiðingum, sum tær hava við sær. Meðan menniskju sambært deontologinum hava skyldu til at tosa satt, halda síni lyfti og verja rættindi og ognir hjá øðrum, so heldur utilitaristurin, at ein gerð, sum hevur við sær mest møguligu eydnu til størst møguligt tal er ein góð gerð – uttan mun til, um hon hevur við sær lyftisbrot, lygn ella brot á rættartrygd hjá einum ella nøkrum fáum øðrum menniskjum.

Bæði sjónarmið hava íbygdar trupulleikar, og tey finnast valla heldur nakrastaðni í tí reina og sera einfalda skapi, sum tey eru lýst omanfyri. Tann deontologiska rættindahugsanin hjá serliga týska heimspekinginum Immanuel Kant og tann utilitaristiska nyttuhugsanin hjá serliga enska heimspekinginum Jeremy Bentham eru t.d. sameindar í klassiska verkinum “A Theory of Justice” hjá amerikanska heimspekinginum John Rawls.

Her verður gjørd ein roynd at seta nakrar útvaldar politiskar gerðir í Føroyum hesum viðvíkjandi í sambandi við hesi bæði sjónarmiðini, tá ið tað ræður um lutfallið millum almennan rætt og vald í føroyskum politikki.

## At hava rætt og at fáa rætt – eitt dømi úr søguni

Tá føroyski fólkatingsmaðurin Jóannes Patursson í 1906 kom til Føroya við einum tilboði um størri fíggjarligt sjálvstýri í Føroyum, helt hann uppá, at hann hevði fingið hetta tilboðið frá tí samlaðu donsku stjórnini. Ivi varð tó sáddur um hetta av hansara mótstøðumonnum í løgtinginum, hóast danski løgmálaráðharrin Peter Alberti vegna stjórnina seinni í 1906 mótvegis løgtinginum váttaði, at tilboðið stavaði frá tí samlaðu donsku stjórnini. Mótstøðufólkini móti tilboðnum í løgtinginum, sum kallaðu Jóannes Patursson og sjálvstýrisfólkini fyri “brændevinspartiet”, vunnu bæði løgtingsog ríkisdagsvalini hetta árið. Tilboðið um størri fíggjarligt sjálvstýri varð vrakað av løgtinginum, men Peter Alberti gjørdi á fólkatingi greitt, at fóru føroyingar seinni at seta fram krøv um fíggjarligt sjálvstýri, so fór danska stjórnin at játta hetta. Hetta seinna var grundin til, at mótstøðufólk móti tilboðnum knýttu Peter Alberti at tilboðnum í 1908, tá hann fall sum løgmálaráðharri orsakað av eini stórari fíggjargølu í Sjællands Bondestands Sparekasse, har hann var nevndarformaður.

Føroyski fólkatingsmaðurin fyri Sambandsflokkin, Oliver Effersøe, sum síðan 1906 hevði lagt sjálvstýrisfólk undir at vera seperatistar, nýtti nú, í 1908, høvi til at knýta fíggjarliga svikið hjá Peter Alberti at tilboðnum um fíggjarligt sjálvstýri og Jóannesi Patursson, sum hann segði vera bestu vinmenn. Tilboðið um fíggjarligt sjálvstýri stavaði sambært honum ikki frá samlaðu donsku stjórnini, sum Jóannes Patursson vildi vera við, men tað var nakað, sum “storbedrageren” Alberti og vinmaðurin Jóannes Patursson høvdu bryggjað saman.

Seinni er tað vorðið greitt, at tilboðið, eins og Jóannes Patursson frá byrjan av hevði hildið uppá, stavaði frá tí samlaðu donsku stjórnini. Heldur ikki var tað løgmálaráðharrin, men fíggjarmálaráðharrin Vilhelm Lassen, sum doyði longu í 1908, ið vegna Jóannes Patursson hevði lagt tilboðið fyri samlaðu donsku stjórnina í 1906. Leikluturin hjá Peter Alberti var á ongan hátt avgerandi, men danska stjórnin var í 1908 undir stórum trýsti frá andstøðuni, eftir at løgmálaráðharrin orsakað av skuldsetingum um fíggjarligt svik noyddist at leggja frá sær. Hetta var helst grundin til, at nýggi danski løgmálaráðharrin Svend Høgsbro, eftir at Oliver Effersøe í 1909 hevði sett fram somu skuldsetingar í fólkatinginum, vegna donsku stjórnina upplýsti, at tilboðið varð tikið aftur og at tað ikki fór at verða sett fram aftur. Tað er einki at ivast í, at Jóannes Patursson hevði rætt, tá hann tvíhelt um, at tilboðið stavaði frá tí samlaðu donsku stjórnini, men tað eydnaðist kortini Oliveri Effersøe við at bera fram ósannindi um eitt privat tilboð frá “storsvindleren” Alberti at fáa donsku stjórnina til at taka tilboðið aftur. Jóannes Patursson hevði rætt, men tað eydnaðist Oliveri Effersøe at fáa rætt. Tann politiska skipanin var um hetta mundið skipað soleiðis, at tað aloftast bert var meirilutin í Føroyum, sum var umboðaður á fólkatingi við tveimum umboðum, meðan eingin talaði fyri tí stóra minnilutanum í Føroyum.

Uttan at taka støðu til, hvør av teimum føroysku høvuðspersónunum annars hevði betri moral, so er tað við støði í einum deontologiskum sjónarhorni greitt, at framferðarhátturin hjá Oliveri Effersøe var átaluverdur í hesum málinum. Hinvegin er tað eitt sindur truplari at taka dagar ímillum gerðirnar hjá teimum báðum við støði í einum utilitaristiskum sjónarhorni. Tað er ikki lætt at meta um ella í hvønn mun

**Idealisturin heldur uppá, at tað er tann almenna hugsjónin um tað rætta, sum vinnur fram í søguni, meðan realisturin heldur, at hugsjónin um tað rætta bert er eitt skálkaskjól, sum tann altíð sjálvsøkna valdsgirndin og valdið fjalir seg aftanfyri**

tað, at tilboðið í 1909 endaliga varð tikið aftur, hevði við sær, at tann samlaða nøgdin av eydnu gjørdist størri ella minni millum føroyingar, men í veruleikanum skal eydnan hjá dønum og annars øllum teimum, sum kunnu hugsast at vera ávirkaði av avgerðini, telja við. Hetta vísir eisini ein av stóru trupulleikunum við utilitarismuni, men í okkara høpi er tað meira avgerandi, at hóast lygn og ósannindi ikki telja við sum sjálvstøðug fyribrigdi hjá einum utilitaristi, so telja tey við í tann mun, at lyftisbrot, lygnir og ósannindir hava óhepnar avleiðingar.

Tað er sjálvandi heldur ikki lætt at meta um ella í hvønn mun tað, sum Oliver Effersøe gjørdi í 1906-09, økti ella skerdi samlaðu eydnuna millum tey, sum vóru ávirkaði av hansara gerðum, men tað er nakað lættari at meta um (neiligu) politisku avleiðingarnar. Nógv bendir á, at tað harða politiska stríðið um tilboðið, sum bæði fevndi um ósannindi og óreiðiligar persónligar skuldsetingar, skaddi álitið millum teir báðar politisku flokkarnar í Føroyum, og at hetta eisini kom at hava neiliga ávirkan á føroyskan politikk nógv ár framyvir.

Hetta er kanska ein av teimum ítøkiligu, mátandi og neiligu avleiðingunum av m.a. óreiðiligum orðaskifti í politikki, meðan tað er nógv torførari at máta nakað so ógreitt sum nøgdina av eydnu í einum samfelag.

**Tað er ikki lætt at meta um ella í hvønn mun tað, at tilboðið í 1909 endaliga varð tikið aftur, hevði við sær, at tann samlaða nøgdin av eydnu gjørdist størri ella minni millum føroyingar, men í veruleikanum skal eydnan hjá dønum og annars øllum teimum, sum kunnu hugsast at vera ávirkaði av avgerðini, telja við**

## Nýggjari dømi úr føroyskum kommunalpolitikki

Úr einum deontologiskum sjónarhorni var tað sjálvandi ikki rætt, tá ið Heðin Mortensen í 2004 breyt eina avtalu um samgongu, ið hann hevði vegna Sambandsflokkin í Tórshavnar býráð hevði gjørt við Fólkaflokkin og Jan Christiansen, sum skuldi vera borgarstjóri. Tað var heldur ikki rætt, at Heðin Mortensen uttan um hini umboðini í Sambandsflokkinum, sum stóðu aftanfyri nevndu avtalu, gjørdi eina nýggja avtalu við aðrar flokkar í býráðnum, har hann sjálvur gjørdist borgarstjóri. Úr einum deontologiskum sjónarhorni eiga lyfti og avtalur at verða hildnar, tí tað er tað, sum tað merkir, tá ið avtalur verða gjørdar millum fólk. Tað ber ikki til at bróta lyfti og avtalur bara tí, at tað nú gagnar okkum, tí so er eingin grund til at gera nakrar avtalur.

Utilitaristurin vil hinvegin siga, at hevur eitt avtalubrot við sær, at tann samlaða samfelagsliga eydnan økist meira enn hon minkar millum einstakar borgarar, so er gerðin – t.e. avtalu- ella lyftisbrot – at meta sum góð.

Tað er sjálvandi ógjørligt her at gera eina meting av, um tað, at Heðin Mortensen gjørdist borgarstjóri, økti um ta samlaðu eydnuna í Havnini ella í Føroyum yvirhøvur, men tað kann hinvegin staðfestast, at hann sum frá leið gjørdist ein óvanliga væl dámdur borgarstjóri í Havn. Heldur ikki tykist tað, at hann kom til valdið við at bróta eina avtalu við m.a. Fólkaflokkin hava verið nakað, sum veljarar í Havn hava ynskt at revsa hann fyri. Hinvegin ber til at spyrja, um tað, at hann kom til valdið við at bróta eina avtalu á annan hátt hevur havt nakrar neiligar avleiðingar. Tað er ein legitimur spurningur at seta – eisini innanfyri eitt utilitaristiskt sjónarhorn. Tí tað kundi jú verið, at ein avleiðing av lyftis- og avtalubroti millum politikarar var, at tílík atferð fór at breiða seg í politisku skipanini. Og verður tað vanligt innan politisku skipanina, at politikarar loypa frá avtalum, so er ikki torført at síggja, at avleiðingin kann vera ein politisk skipan, har misálit verður tað vanliga millum politikarar, sum í veruleikanum noyðast at hava álit á hvørjum øðrum. Vit hava longu sæð, at sama mannagongd, sum Heðin Mortensen brúkti mótvegis Jan Christiansen, nú, í 2016, er brúkt av Anniku Olsen og Fólkaflokkinum saman við Tjóðveldi og Framsókn mótvegis Heðini Mortensen sjálvum. Og grundgevingin, at hetta var akkurát tað sama, sum Heðin Mortensen sjálvur gjørdi móti Fólkaflokkinum og Jan Christiansen í 2004, er ofta at hoyra. At tað júst var Fólkaflokkurin í Tórshavnar býráð, sum framdi hetta avtalubrotið móti Heðini Mortensen, kann eisini beinleiðis tulkast sum ein tøkk fyri seinast. Men avleiðingarnar av hesum avtalubrotunum endaðu ikki her. Fyrst hótti tann frákoyrdi Heðin Mortensen, sum eisini sat í løgtinginum fyri Javnaðarflokkin, landsstýrissamgonguna millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn, ið hann sjálvur var avgerandi parlamentariskt grundarlag undir; síðan hevur fráfarandi býráðssamgongan í Havn, sum helt seg hava verið fyri órætti, avgjørt at skerja virkismøguleikarnar hjá komandi býráðssamgongu við at lækka skattaprosentið í Havn við 0,75%. Men verður tílíkt mistreysti og misálit sátt innan politisku skipanina bert við tí grundgeving, "at hetta er politikkur", so kann tað ikki bara breiða seg til alla politisku skipanina, sum verður atgerðarleys, men tað kann eisini breiða seg til alt samfelagið – til skaða fyri okkum øll, tí álit er ein grundleggjandi treyt fyri eini vælvirkandi politiskari skipan og einum vælvirkandi samfelagi. Tað er ikki bert ein bólkur av menniskjum, sum eru politikarar, men menniskjað er sambært Aristoteles eitt politiskt djór.

**Verður tað vanligt innan politisku skipanina, at politikarar loypa frá avtalum, so er ikki torført at síggja, at avleiðingin kann vera ein politisk skipan, har misálit verður tað vanliga millum politikarar, sum í veruleikanum noyðast at hava álit á hvørjumøðrum**

Í løtuni er tað lítið, sum bendir á, at veljarin revsar politikarar, sum brúka lyftis- og avtalubrot fyri at koma framat valdinum, men heldur tykist veljarar hugsa meira um tað, sum politikarar gera fyri teir, meðan teir hava valdið. Hetta kann vera eitt tekin um, at tann utilitaristiska nyttuhugsanin er ráðandi innanfyri politikk, meðan pliktin til at halda tað ein lovar og sigur hevur trong kor í politikki; men tað kann eisini merkja, at tað mistreysti, sum tykist breiða seg í politisku skipanini, eisini hevur fingið fótafesti millum vanligar veljarar. Mest sannlíkt er hetta eisini tekin um, at vantandi mannagongdir í býráðsarbeiðinum gevur einum meiriluta góðar møguleikar fyri at fremja ætlanir, sum tæna ávísum veljarabólkum, meðan aðrir veljarabólkar ikki halda síni sjónarmið verða hoyrd. Skipanin er ikki semjufremjandi, men elvur til spjaðing millum veljarar.

## Løgting og kommunur

Tað er trupult at ímynda sær, at tað nakrantíð fer at bera til at gera eina skipan, sum forðar fyri politiskari valdsmisnýtslu, men tað ber til at gera skipanir, sum avmarka møguleikarnar hjá politikarum at seta vanligar reglur úr gildi. Politikarar eiga sjálvandi eins og onnur fólk at halda tær avtalur, sum teir gera, soleiðis at skipanin – fyri eisini at brúka utilitaristiskan málburð – fremur mest møguliga eydnu til størst møguligt tal.

Í løgtinginum eru skipanir mentar, sum forða fyri, at tilvildarlig politisk "hevnisøka" kann fáa stóran týdning fyri politisku gongdina. Eitt nú er tað ikki einans politiskt snildi, sum eisini kann fevna um at ríða á fleiri hestum í senn, ið avgera, hvør fær samráðingarrættin eftir val. Løgmaður hevur hendan rættin, til hann ikki longur heldur seg vera føran fyri at fáa undirtøku fyri einum landsstýrissamstarvi. So leggur hann heimildina frá sær og løgtingsformaðurin gevur samráðingarrættin til onkran annan floksformann, ofta formannin í tí størsta flokkinum. Hesin fær so møguleika fyri at samráðast um nýtt landsstýri. Einki óvæntað kongamorð.

Eisini er tað so, at landsstýrið í sambandi við val bert virkar sum eitt "forrætningsministerii", sum tekur sær av heilt átrokandi viðurskiftum. Fráfarandi landsstýrið kann heldur ikki beint eftir val taka týðandi avgerðir, sum órógva ella skerja virkisføri hjá einum komandi landsstýri, m.a. við at lækka skattaprosentið í Føroyum. Harumframt er nógv neyvari eftirlit við, at landsstýrið brúkar skattaborgarans pening skynsamt og í samsvari við tað, sum hann var játtaður til, enn tað er við kommununum. Hetta ósamsvarið er so mikið sjónligari, tá havt verður í huga, at tað er nógv meira av peningi til avlops at gera gott við hjá politikarum í eini stórari og ríkari høvuðsstaðarkommunu enn tað er hjá landsstýrinum, har játtanir ofta eru oyramerktar til ymisk øki.

**Í løgtinginum eru skipanir mentar, sum forða fyri, at tilvildarlig politisk "hevnisøka" kann fáa stóran týdning fyri politisku gongdina**

Tað er harvið ikki sagt, at tann landspolitiska skipanin virkar optimalt, men hevði ein líknandi skipan verið galdandi í sambandi við rakstur, fyrisiting og samgonguskifti í kommunum, so hevði ta lítið sømiliga politiska spæl í Havn við avtalubroti og eftirfylgjandi "hevndartiltøkum" valla sloppið at gingið fyri seg. Her er neyðugt og gagnligt, at løgtingið ásetur neyvari eftirlit við rakstri, avmarkaðar heimildir hjá einum fráfarandi býráði og ásetur greiðar mannagongdir í sambandi við samráðingar um nýggja býráðssamgongu eftir býráðsval. Og hendan seinasta tíðin hevur eisini víst, at borgarstjórar ikki samstundis eiga at sleppa at sita í løgtinginum.

## Ein niðurstøða

Býráðsmeirilutarnir skulu sjálvandi ikki skjerjast avgerandi í teirra virkisføri í sambandi við at fremja átøk, sum økja um eydnuna hjá teirra veljararum – fyri at halda okkum til utilitaristiskan málburð – men tað er neyðugt at áseta nakrar yvirskipaðar karmar og skyldur – fyri at halda okkum til deontologiskan málburð – hjá býráðsmeirilutunum at virka innanfyri, soleiðis at tað verður tryggjað, at býráðsmeirilutin eisini tekur sær av rættindunum hjá øllum borgarum í kommununi. Utilitaristisk nyttuhugsan verður heldur ikki framd við at geva meirilutum fríar teymar til at tekkjast einum meiriluta av veljarunum, men hon má sameinast við eina deontologiska rættinda- og plikthugsan, sum tryggjar, at meirilutin eisini virkar fyri teimum flestu.

Í býráðunum er í løtuni ov nógv rúm fyri persónligum ambitiónum, sum ikki endiliga gagna teimum flestu.